# Tekur Athena sjógv inn, er ein reellur vandi fyri, at skipið søkkur – ja!

SUNLEIV HØJGAARD

– Um eina løtu fara pumpurnar í gongd, og so fáa vit at síggja, hvussu er. Skipið er stórt, og tí er tað ikki løtuverk at pumpa, um tað skuldi verið.

Men sleppa tit heilt niður í skipið eftir sjógvi?

– Nei, vit sleppa ikki so væl niður, og tað er kanska einar sjey metrar hjá pumpunum at pumpa sjógvin upp. Vit hava nakrar trýstpumpur, og tær orka at pumpa. Meiningin er at byrja upp á hetta arbeiði nú, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur.

Vita tit í løtuni, hvussu djúpt afturendin á skipinum stingur nú í mun til frammanundan?

– Ja, tað vísir seg, at afturendin nú stingur ein ella hálvan annan metur djúpri enn áður, legði Sunleiv Højgaard aftrat.

Er nakar vandi fyri, at skipið tekur í botn sum nú er?

– Jú, har er ikki so ógvuliga langt eftir niður á botn. Men vit hava nú bundið skipið ovarlaga, so tað ikki skal detta út frá bryggjuni, um tað skuldi hent, at tað tók í botn.

Er nakar vandi fyri, at Athena søkkur við oljubryggjuna?

– Eg noyðist helst at vanda mær um orðini, men um skipið tekur sjógv inn, er ein reellur vandi fyri, at tað søkkur – ja!

Átaksleiðari legði í hesum sambandi aftrat, at tað er ikki so nógv við oljubryggjuna, og tí hevði Athena kanska ikki farið so langt, um hon sakk.

Sosialurin spurdi eisini átaksleiðaran síðstu nátt, um sløkkiliðsfólk vóru vitandi um, hvørt skipið lekur?

– Nei, tað veit eg ikki við vissu í løtuni, segði Sunleiv Højgaard, tá Sosialurin hitti hann á oljubryggjuni hjá Runavíkar havn makað eftir midnátt í gjárkvøldið.

vilmund@sosialurin.fo



*Sosialurin hitti átaksleiðaran fyri Skálafjarðar Sløkkilið, Sunleiv Højgaard, á oljubryggjuni hjá Runavíkar havn nakað eftir midnátt í gjárkvøldið, tá nógvur aktivitetur var um Athenu*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Hava fingið tamarhald á Athenu

**ATHENA Um hálvgum fimm tíðina í morgun sendi løgreglan út eitt tíðindaskriv, har sagt verður, at tamarhald er fingið á støðuni við Athenu**

Vilmund Jacobsen

Løgreglan hevur stundisliga í morgun sent út eitt tíðindaskriv, har víst verður á, at tað í gjárkvøldið vísti seg, at Athena, sum liggur við oljubryggjuna hjá Runavíkar havn, hevði tikið sjógv inn. Eisini sást nakað av royki.

– Eftir eldsbrunan fyrr í vikuni hevur brand- og eftirlitsvakt verið á staðnum og hevur alla tíðina fylgt støðuni.

Løgreglan vísir í skrivinum á, at avvarðandi tilbúgvingarmyndugleikar hava síðani í gjárkvøldið og í nátt arbeitt við málinum.

– Alt bendir á, at orsøkin til, at skipið tók sjógv inn, er ein fylgja av eldsbrunanum. Stig vórðu beinanvegin tikin til at fáa til vega og seta upp pumpuútgerð og aðra neyðuga útgerð.

Løgreglan sigur í endnum av tíðindaskrivinum, at tamarhald nú er fingið á støðuni.

## 500 tons av sjógvi

Við útvarpið í morgun segði Vilhelm Olsen hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, at helst eru eini 500 tons av sjógvi likin inn í Athenu, og hetta førdi í nátt til, at afturendin á skipinum helst stakk hálvan annan til tveir metrar djúpti enn annars.

Vilhelm Olsen segði, at tað hevði eydnast sløkkiliðnum at pumpa eini 300 tons av sjógvi úr skipinum.

Hann legði aftrat, at teir nú høvdu sæð niður á maskinuna, og at tað vísti seg, at sjógvurin er niðri í maskinrúminum.

– Vit hava eisini sæð, at tað er eitt rør, sum sprænir sjógv inn í skipið, og í morgun fóru teir at royna at gera proppar sum vónandi kundu tetta henda lekan.



Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilhelm Olsen segði tíðliga í morgun, at enn høvdu teir ikki fingið tett henda lekan.

vilmund@sosialurin.fo



# TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, svigarmamma, omma og langomma

## Henny Andreasen

so brádliga varð frá okkum tikin, og var jarðað.

Tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt mintust okkum í stóru sorg okkara.
Tøkk fyri hjálpsemi og umsorgan.

***Burtur úr likaminum, heima hjá Harranum.***

***Familjunnar vegna***
**Hanna, Lis, Marne, Óla Hans og Linda**